## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# *– Tað ger ikki Heðin, hann er so »besjeðin«*

**60 ÁR**

Í morgin verður Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn seksti. Í hesum sambandi beyð hann til móttøku í Müllers Pakkhúsi í Havn í gjár. Og tað var vorðið sum karmur, um slíka hátíðarløtu.

Rættuliga nógv fólk høvdu leitað sær út í Lágabø í Havn hendan vakra sólskinsdagin at heiðra borgarstjóranum. Har vóru røður, sangur og tónleikur.

Fyrstur at taka orðið var Sverre Midjord, løgtingsmaður av Tvøroyri. Hann og Heðin hava kenst leingi, og hava sitið saman í stjórn ÍSF's øll árini - Heðni í góð 25 ár og Sverre í 43 ár.

Sverre Midjord vísti á, at Heðin Mortensen ikki er einasta eksportvøra, tey á Tvøroyri hava útflutt til Havnar: Hann flutti sum smádrongur til Havnar at búgva við foreldrunum.

– Ogur hava eisini givið tygor sjálvan lúggmann. Og nú tygor tosa so nogv um Stórutjørn, so kann je fortelja tygon, at Jákup á Dul Jacobsen eisini er av Tvøroyri - av Tvørábakka, segði Sverre Midjord skemtandi. (Pápi Jákup á Dul, Poul Jacobsen, er ættaður av Tvøroyri, red.).

Og sum eitt kuriosum segði Sverre Midjord eisini, at tey á Tvøroyri eisini hava eksporterað sjálvan fólkatingsformannin, Christian Mejdal, sum er føddur á Tvøroyri, har pápi hansara var prestur.

Aðrir røðarar vóru eisini, bæði fólk úr umsitingini á býráðnum, Óli Holm, formaður í Fótbóltssambandinum, sonurin Eirikur og onnur við.

Kim Hansen sat við klaverið og gjørdi løtuna hugnaliga á tann hátt, men tónleikainnsløgini frá Musikkskúlanæmingum, frá Dupultkvartettini úr Ebebezer, manskóri av býráðnum og Havnarkórinum settu sín serliga dám á.

Manskórið av býráðnum sang ein sang, sum yrktur var til høvi. Hjørdis og børnini høvud eisini gjørt ein sang, sum varð sungin sum felagssangur, og Havnarkórið sang ein sang, sum Suni F. Joensen – sera dugnalig V4-táttayrkjarin mikli – hevði yrkt, tann sangurin sæst her á síðuni.

Fleiri hundrað fólk nutu høvið at heiðra Heðini Mortensen.



*Hjørdis og Heðin Mortensen. Í gjár buðu tey til stórfingna móttøku í Müllers Pakkhúsi í Havn í sambandi við 60 ára dagin hjá Heðini, sum er í morgin, 7. apríl*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

## Sangur til Heðin

*– sum Havnarkórið framførdi á móttøkuni í gjár*

*Lag; Gubba Noa*

*Eitt er tað ið, vit romantiskt, kalla Lívsins vár.*
*Nostalgi hjá okkum gomlu, nú ið grána hár.*
*Snýr tað seg um Heðin*
*viknar ikki megin*
*Hóast hann í dag kann runda síni seksti ár.*

*Hóast vit frá føðing eru næstan sama slag*
*syngja vit, sum tíðin líður, ikki sama lag.*
*Tak tildømis Heðin*
*Stutt sagt, hann er egin.*
*Tí hann megnar túsund størv ímillum ár og dag.*

*Summi vilja fegin hava einhvønn nevndarsess,*
*stríðast fyri hesum til tey næstan fáa stress.*
*Tað ger ikki Heðin.*
*Hann er so »besjeðin«,*
*flytir lættur stól av stóli, uttan nakað press.*

*Skútan er polittisk, við og uttan føgur orð.*
*Stavnhaldið sigst vera tað at betra fólksins kor.*
*Fattur stendur Heðin*
*mittskips, báðumegin,*
*fúsur til at røkja bæði bak- og stýriborð.*

*Tey ið søktu tindarnar, men komu ei uppá,*
*kendu ikki kuldan, har ið tjúkkur kavi lá,*
*gjørdust kanska fegin,*
*um tey sóu Heðin*
*fáa sinkadusara, polittiskt, frammaná.*

*Fjøldin er tó samsint, tá ið talan er um hann,*
*undrast á at fátt er tað ið hesin ikki kann.*
*Heittu tey á Heðin,*
*kom hann beinanvegin.*
*Tað var ikki eiti á teir útvegir hann fann.*

*Tíðir koma, tíðir fara, jørðin melur enn*
*Av og á hon fann uppá at fostra megnarmenn.*
*Okkara er gleðin,*
*nú vit heiðra Heðin,*
*borgarstjóra ið væl megnar fleiri størv ísenn.*

*sfj*





*Sverre Midjord og Heðin Mortensen eru og hava verið sera góðir vinir í mong ár. Teir hava sitið í stjórn ÍSF's esamn í eina fjórðingsøld*



*Sera nogv fólk nýttu høvið at heiðra borgarstjóran í Havn á seksti ára degnum í Müllers Pakkhúsi í Havn í gjár*